# ítróttur

Nr. 165 • mikudagur • 29. august 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# HB fer ikki at rinda endurgjald

*Tað kann so ikki metast órímiligt, at leikararnir sleppa at vera heima í í øllum førum 24 tímar, áðrenn dystur skal leikast, heldur Steinfinnur Mittelstein*



**Hóast HB frá fyrstan tíð noktaði hesum, hevur FSF álagt felagnum at rinda NSÍ 10.000 krónur í samband við dystarflyting. HB hevur tó ongar ætlanir um at gjalda hesa upphædd, og hava teir mótmælt framferðini hjá FSF**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Týskvøldið eftir at blaðið fór til prentingar, skuldu HB og NSÍ spæla útsetta dystin í fyrstu deild.

Sum kunnugt hevur ikki sørt av stríði staðist av hesum dystinum. Runavíkingar hava verið í øðini um, at FSF hevur flutt dystin, uttan so mikið sum at spyrja teir eftir, og bæði í leygardags- og týsdagsblað okkara hava ávíkavist venjarin og formaðurin í NSÍ givið sína misnøgd til kennar.

## Nokta endurgjald

Runavíkingar eru tó ikki teir einastu, sum eru vorðnir firtnir í hesum málinum.

Eisini í HB er misnøgdin stór. Hetta tí FSF hevur álagt havnarfelagnum at rinda NSÍ 10.000 krónur í endurgjaldi fyri flytingina. Hetta til at rinda tær útreiðslur, sum runavíkingarnir hava av flytingini.

Orsøkin til misnøgdina hjá HB er tann, at teir alla tíðina hava hildið fast um, at eitt møguligt endurgjald als ikki fór at koma upp á tal.

Steinfinnur Mittelstein, sum er stjóri í P/F Havnar Fótbóltur, sigur við Sosialin, at flytingin fyrst og fremst komst av, at eitt mistak varð framt, tá ferðin til Eysturríkis varð bíløgd. Sambært skránni fyri ferðina, skuldi hópruin hjá HB verið aftur í Føroyumj fríggjadagin, men á ferðini varnaðust teir, at ferðin úr Danmark til Eysturríki tók nógv longri, enn ásett var.

Steinfinnur Mittelstein sigur, at teir tá settu seg í samband við NSÍ, og tá teir noktaðu at flyta dystin, settu teir seg í samband við FSF.

- Vit tosaðu við kappingarstjóran, og hann skilti væl trupulleikan, sum vit nú høvdu rent okkum í. Meðan vit soleiðis tosaðu saman um, hvørjir møguleikar vóru at flyta dystin, nevndi hann møguleikan fyri einum endurgjaldi, men tað søgdu vit korta nei til, og so varð ikki tosað meira um tað.

- Hóskvøldið fingu vit so boð um, at ynski um flyting var gingið okkum á møti. Tey boðini vóru tó givin um telefonina, og av formligum ávum bóðu vit so eisini um, at boðini vórðu givin okkum við faksi.

- Tað var sum so eingin trupulleiki. Faksið varð eisini sent okkum, men tá vit leygardagin lesa hetta, síggja vit, at HB verður álagt at rinda NSÍ 10.000 krónur. Hetta høvdu teir einki nevnt um í telefonsamrøðuni við okkum, og teir vistu eisini framman undan, hvørji boðini frá okkum vóru um hetta. Vit gjørdu greitt, at hetta kom ikki upp á tal, og tað ger tað framvegis ikki, sigur Steinfinnur Mittelstein, sum vegna Havnar Fótbóltur í gjár sendi skriv til FSF, har teir gera vart við hetta.

## Vandamikil leið

Tað eru fleiri lutir, sum gera, at stjórin í havnarfelagnum er somikið misnøgdur um hetta.

- Fyri tað fyrsta, so hevur FSF valt, at føroyskur fótbóltur skal taka lut í altjóða kappingum, og hetta hevur so eisini gjørt, at føroysku feløgini koma út í Europa.

- Hesir dystir verða aloftast spældir mitt í viku, og gjarna hóskvøld, og tí er tað onkun tíð neyðugt, at dystir mugu flytast. Tað kann so ikki metast órímiligt, at leikararnir sleppa at vera heima í í øllum førum 24 tímar, áðrenn dystur skal leikast. Vit høvdu upprunaliga ætlað at spæla sunnudagin, men tá vit varnaðust, at heimferðin varð seinkað, gjørdu vit alt fyri eitt vart við hetta.

- Harafturat haldi eg, at tað er sera vandamikið, um FSF nú fer at áseta bøtur ella endurgjald, um dystir skulu flytast. Í hesum førum hava teir valt 10.000 kr., men nær skal talan verða um 5.000 ella 15.000. Hjá onkrum felag er talan um fleiri skúlanæmingar, og skal endurgjaldið tá verða minn, ella skulu feløgini til at dokumentera mista inntøku hjá spælarunum?

- Hetta kann eisini viðføra, at øll feløg framyvir seta seg ímóti at flyta dystir, um fyrispurningur kemur um hetta. So verður málið latið FSF, og so kann felagið fáa endurgjald. Tá fer tað at snúgva seg um, hvussu nógv felagið kann vinna fíggjarliga við eini flyting, heldur enn at ítróttarligu sjónarmiðini verða nýtt.

## Mugu hava greiðar reglur

At enda sigur Steinfinnur Mittelstein, at hann als ikki er ósamdur við NSÍ-formanninum, tá hesin í blaðnum í gjár ger vart við, at føroyskum fótbólti tørvar greiðar reglur um, hvussu skal farast fram í slíkum málum.

- Tað vildi ikki verið annað enn náttúrligt, at fastar mannagongdir vórðu skipaðar hesum viðvíkjandi. Sum nú er, verður støða tikin, tá trupulleikin kemur, og tað átti ikki at verið neyðugt.

- Tað kundi til dømis eitt krav, at leikarar sluppu at vera heima í 24 tímar undan dysti, ella eisini kundi atlit verði tikið til hetta, tá skráin fyri kappingarárið verður løgd.

- Tá skráin verður løgd, vita vit longu, hvørji feløg taka lut í europeisku kappingunum, og vit vita eisini, nær UEFA hevur ásett leikdagarnar. Tí átti tað ikki at verið ógjørligt, at lagt upp fyri slíkum flytingum, tí tað ber ikki til, at tað á hvørjum ári skal gerast ein trupulleiki, tá vit eru komin í august mánað.

- Hvat fer til dømis at henda, tann dagin eitt føroyskt lið spælir seg fram til næsta umfar? Tá eru vit komin til endan á kappingarárinum, og tí verður trupulleikin tá uppaftur størri, um vit ikki hava greiðar mannagongdir at ganga eftir, sigur Steinfinnur at enda.



# Nú er aftur rok í FCK

**Heine Fernandez hevur fingið stóra bót, tí hann alment hevur havt at venjaranum fyri at taka Toda framum seg, tá FCK spældi Europa Cup í Róm**

SUPERLIGA
*Jóannes Hansen*

Vánalig umrøða er betur enn eingin umrøða. Soleiðis verður onkuntíð tikið til. Men hetta er neyvan nakað, sum teir í leiðsluni í felagnum hjá Toda Jónsson, FCK, vilja skriva undir upp á í løtuni.

Sunnudagin leyp ein ordulig skriða í sambandi við felagið, og mánadagin varð við tíggju tumma seymi staðfest, at tað eru ikki fleiri skiparar í FCK, og at tað í hvussu so er ikki eru spælararnir, sum hava avgerðarrættin og harvið gera av eitt nú, hvussu liðið skal síggja út, og hvat skal sigast um innanhýsis viðurskiftini.

## Todi óbeinleiðis uppií

Tað var liðfelagin og ein av kappingarneytunum hjá Toda Jónsson, sum er orsøk til rokið, ið hevur verið seinastu dagarnar. Heine Fernandez var stóra sigurshetjan, tá FCK á heimavølli hevði vunnið 2–1 á Lazio. Tá liðini hittust í Róm, var Fernandez á beinkinum, tí venjarin heldur vildi hava Toda Jónsson í álopinum.

Sjálvandi var Fernandez vónbrotin. Tað eiga allir fótbóltsspælarar at vera, tá teir verða vrakaðir. Men tað man hava kókað yvir hjá Heine Fernandez, tí í Jyllandspostinum sunnudagin kundi hann ikki halda sær. Hann hevði harðliga at venjaranum fyri at hava broytt liðið, og tað vil siga, at hann óbeinleiðis kritiseraði Kent Karlsson fyri at hava tikið Toda Jónsson inn á liðið og fyri at hava sett Fernandez á beinkin. Hann kritiseraði venjaran fyri at vera veikan og einki framrættaðan, og hann setti FCK leiðsluna – og tað vil siga Niels Christian Holmstrøm og Flemming Østergaard – dyggiliga upp á pláss, tí teir høvdu valt ein veikan venjara at taka yvir eftir Roy Hodgson, sum sambært Fernandez var av heilt øðrum tilfari enn nýggi venjarin.

Eingin spælari í FCK hevur viljað havt nakrar viðmerkingar til gorið og gallið frá álopsmanninum. Onkur hevur ásannað, at Kent Karlsson hevur øðrvísi og meiri róliga framferð enn Roy Hodgson hevði, men tað verður ikki mett at vera nøkur vánalig dygd.

Todi Jónsson sigur einki um tað, at liðfelagin heldur tað vera við síðuna av, at venjarin í Róm valdi Toda framum. Men á heimasíðuni hjá sær – todi.fo – greiðir Todi frá avleiðingunum, sum tað hevði fyri seg, at Fernandez ikki var við í Silkeborg sunnudagin:

– Eg var ikki heilt væl fyri í lærinum, men eg noyddist at spæla frá byrjan, tí hvørki Zuma ella Fernandez vóru við í Silkeborg, sigur Todi. Hann leggur afturat, at hann framvegis kennir lærskaðan plága, tá hann í skundi skal seta fulla ferð á. Todi gleðir seg um, at tað nú er steðgur í tvær vikur:

– At landsdystir eru á skránni í vikuskiftinum og mitt í komandi viku ger, at tað verður møguleiki fyri at koma seg heilt, áðrenn tað annað vikuskifti aftur verður farið undir landskappingina, sigur Todi Jónsson.

Um orsøkina til, at Fernandez ikki var við í Silkeborg, søgdu teir í FCK, at tað var tí, at hann leygardagin var vorðin skaddur. Men ta ljóðaði ikki so sannførandi.

## Raka pengapungin

At Heine Fernandez hevur verið so opinskáraður um leiðsluna í felagnum, hevur hann fingið boð um fer at raka pengapungin hjá honum, og í donsku fjølmiðlunum verður tosað um, at tað kann væl vera, at tað fyri Fernandez sjálvan hevur verið ein so mikið stór dáragerð at seta niður á leiðsluna, at hann fer at verða seldur til okkurt annað felag.

– Heine er ikki ovastur í hierakinum í FCK, og vit fara at geva honum eina stóra peningabót fyri tað, sum hann hevur sagt. Soleiðis segði Niels Christian Holmstrøm mánadagin, men hann vildi ikki siga meiri um, hvussu stór bótin verður, uttan at hon verður so mikið stór, at tað fer at kennast á útgjaldinum.

Tá tað verður tosað um, at tað er møguleiki fyri, at Fernandez skal seljast, so er tað við gongdini í huganum, tá ein FCK maður seinast var so opinskáraður. Talan var tá um David Nielsen, sum alment hevði at felagnum og leiðsluni. Tað hevði við sær, at hann misti plássið á besta liðnum og seinni varð seldur. Tá varð sagt, at tað var ikki í tráð við endamálið hjá felagnum at hava sovornar spælarar í FCK.

Víst verður á møguleikan, at Fernandez fer at verða seldur til Silkeborg, har hann áður hevur gjørt nógv um seg. Silkeborg hevur fyri neyðini at fáa ein vandamiklan álopsspælara, FCK hevur fyri neyðini at sleppa av við ein óskikkiligan spælara, og so átti tað at verið lætt at funnið saman, verður mett í Danmark.

Kent Karlsson, FCK venjarin, hevur ikki havt so nógvar viðmerkingar til álopið frá Fernandez:

– Tað sær út, sum um tað er neyðugt hjá mær at tosa við Heine. Tað fari eg at gera í vikuni, men tað verður ikki gjørt ígjøgnum pressuna, sigur venjarin.

Fernandez veit ivaleyst, at hann er lopin framav, og hann man longu frammanundan hava vitað, at hetta fór at kosta honum nógv. Men hann tykist ikki hava lagt so nógv í tað:

– Eg eri argur, og eg vildi hava alment fram, at eg ikki haldi, at alt í felagnum er, sum tað eigur at vera, um FCK framvegis droymir um at verða eitt stórt og framtíðar rættað felag.

Vit mugu bara staðfesta, at tað er ikki lukkuligt, sum tað tykist níva fast, at hetjan úr Parkini ikki slapp framat beinanvegin í Róm.



*Ítróttarstjórin í FCK, Niels Chr. Holmstrøm, er ikki blíður um orðini, sum Henie Fernandez hevur borið fram í donsku miðlunum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# B36 heldur aftur firmakapping

**Afturvendandi uttanduara firmakappingin verður í ár leikt leygardagin hin 6. oktober**

FIRMAKAPPING
*Jákup Mørk*

Hetta er triðja árið á rað, at yngra høvuðsstaðarfelagið skipar fyri sonenvdu firmakappingini, og sum skilst á lagnum, hevur talan verið um sera væl umtókta kapping. Til dømis fevndi kappingin í fjør um 44 lið, men tá vóru onnur 20, sum ikki sluppu upp í part, tí tey vóru ov sein á sjóvarfallinum, tá tilmeldanin fór fram.

Hetta hevur fingið fyrireikararnar at umhugsa, at økja talið av liðum, men í fyrsta umfari eru hesar ætlanir tó sleptar. Skulu fleiri lið vera við, verður eisini neyðugt at nýta fríggjadagin til kappingina, men tá verður tað helst ov skýmligt at spæla.

Annars verður sagt um kappingina, at hon verður skipað við dystum tvørtur um hálvan vøll. Sjey leikarar kunnu vera á hvørjum liði, umframt eykaleikarar, og einasta treyting er, at eingin á liðnum hevur spælt við í trimum teimum fremstu vaksnamannakappingunum hetta kappingarárið.